umhvørvisstovan

VÁGS KOMMUNA

POSTBOX 29
910 VÁGUR
FØROYAR

Argir hin 6. juli 2011
Málsnr.: 11/00030-14
Tykkara málsnr.:
Málsviðgeri: Heidi Hansen

**Viðvíkjandi: Spillivatnsætlanin hjá Vágs kommunu er góðkend**

Við hesum skal verða boðað frá, at Umhvørvisstovan hin 06.07.2011, sambært § 18, stk. 2 í løgtingslóg nr. 134 frá 29 oktober 1988 um umhvørvisvernd, við seinni broytingum, og § 4, stk. 2 í kunngerð nr. 111 frá 7. september 2009 um spillivatn, hevur góðkent spillivatnsætlanina hjá Vágs kommunu fyri tíðarskeiðið 2011-2015.

Umhvørvisstovan fekk hin 12.01.2011 spillivatnsætlanina til góðkenningar frá Vágs kommunu (mál nr. 10/00030-5). Í sambandi við viðgerðina av ætlanini, hevur Umhvørvisstovan verið í samband við kommununa, og 11.03.2011 varð dagførd ætlan send Umhvørvisstovuni til góðkenningar (mál nr. 10/00030-15).

Út frá eini heildarmeting av upplýsingunum í ætlanini, ið varð send 11.03.2011, verður mett, at komandi spillivatnsskipan í kommununi lýkur ásetingarnar í §§ 8-13 í kunngerðini um spillivatn. Hetta merkir, at spillivatnsætlanin m.a. fevnir um spillivatn frá øllum húsarhaldum, virkjum og virksemi í kommununi, og at spillivatnið eftir reinsing verður leitt gjøgnum lokaða skipan beinleiðis á sjógv við góðum vatnskifti.

Góðkenningin umfatar einans krøv ásett í spillivatnskunngerðini, t.v.s. tann umhvørivsliga partin av spillivatnætlanini. Góðkenningin tekur ikki støðu til hvørjar tekniskar loysnir eru valdar og um teknisku viðurskiftini sum heild eru í lagi, so sum dimensioneringin o.s.fr. Hetta er ábyrgdin hjá kommununi.

Um tað seinni vísir seg, at spillivatnsskipanin elvir til dálking, t.d. uppsavnan av evnum og tilfari, til slóðir í sjónum ella til aðrar broytingar í umhvørvinum, skal kommunan, sambært § 10 stk. 3 í kunngerðini um spillivatn, fremja bøtandi atgerðir, so sum økta reinsing ella føra spillivatnið longur út.

Vinaliga

Jóhanna Olsen, deildarleiðari

/

Heidi Hansen, umhvørvisviðgeri